# Nær verða løgtingsmenn steðgaðir í at hunddálka alment sett starvsfólk?

**OLAUS JESPERSEN**
deildarstjóri



Á Føroya Løgtingi tykist langt ímillum tingmenn, sum hava dirvi at tala at, tá aðrir tingmenn niðurgera alment sett starvsfólk, ið ikki hava møguleika at verja seg móti hunddálkan frá tingmonnum.

Soleiðis var undirritaði eisini hunddálkaður, skuldsettur fyri at vera lógbrótari frá løgtingsins røðarapalli av løgtingskvinnuni Katrin Dahl Jakobsen mikudagin 4. november 2009, uttan at formansskapurin so mikið sum rætti hond frá síðu at steðga hesum ósakliga atburði.

Nær hava vit alment settu fingið nokk? Skal ein løgtingsmaður óátalaður sleppa at dómfella ein borgara fyri lógarbrot, uttan rættarsak, bara tí hann kann verja seg aftan fyri ein politiskan immunitet?

Katrin Dahl Jakobsen segði m.a., at eg visti, at tað, sum eg gjørdi var lógarbrot! Eg meti alt tað, sum løgtingskvinnan segði um meg frá Tingsins røðarapalli, sum so grovar og niðurgerandi skuldsetingar, at eg alment má tala at. Eg havi boðað Katrini Dahl Jakobsen frá, at um hon ikki kemur við eini almennari umbering, so tali eg alment at, men tann umberingin er ikki komin frá henni.

Mær kunnugt hevur løgtingsins røðarapallur ikki verið ein dómstólur. At tingmenn sleppa at nýta tingsins røðarapall til sín privata dómstól fyri at avrætta starvsfólk in absentia, **góðtaki eg ikki**. Skal tann ætlan hennara fremjast móti mær, skal tað ikki verða á Løgtingi, og tað skal so avgjørt ikki verða Katrin Dahl Jakobsen, sum tá førir knívin.

Tað er ein andstyggilig skipan í einum demokratiskum samfelag, at ein tingmaður óátalaður sleppur at dómfella eitt alment sett starvsfólk í sínum egnu, íspunnu jagstran eftir mær í hesum máli.

Málið um reklamu hjá Eik Banka í fólkaskúlanum er avgreitt av tí instansinum, sum Løgtingið sjálvt hevur sett til at viðgerða slík mál við teirri niðurstøðu: **at eingi skjalprógv eru fyri, at Mentamálaráðið hevur brotið marknaðarføringarlógina á nakran hátt**. (sitat Brúkaraumboðsmaðurin).

Áðrenn Katrin Dahl Jakobsen fekk loyvi til frá Tingsins røðarapalli at niðurgera meg, var greitt, at Brúkaraumboðsmaðurin kannaði málið. Tingkvinnan hevði tó størri áhuga í at standa og spilla meg út á Tingsins røðarapalli, har eg ongan møguleika hevði at verja meg, heldur enn at bíða eftir niðurstøðuni frá brúkaraumboðsmanninum. Og tað var henni loyvt av formansskapinum í løgtinginum.

Tí kemur mín verjurøða nú!

Eingi foreldur, og eingin skúlastjóri, hvørki at børnum í Hoyvíkar skúla ella aðrastaðni frá í landinum, hava vent sær til Mentamálaráðið viðvíkjandi tilboðnum til skúlarnar frá Eik. Eg havi spurt skúlastjóran í Hoyvíkar skúla, um foreldur hava vent sær til skúlan viðvíkjandi Eik tilboðnum, og svarið frá skúlastjóranum er: »**Eingi foreldur hava vent sær til mín**. *Katrin ringdi til mín, og eg segði henni, at blaðmaðurin á Dimmu hevði sagt, at foreldur høvdu vent sær til hansara. Hann kundi ikki siga mær hvussu nógv ella hvør. Hetta var tað, eg segði Katrin«.*

So eitt skalt tú vita Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna, allir tínir pástandir móti mær í skrivliga fyrispurninginum tínum um Reklamu í fólkaskúlanum og tað, sum tú undir orðaskiftinum royndi at rógva fram undir, eru ósannindi, illgitingar og reinur heilaspuni frá tær.

Og hettar fær ein tingmaður á Føroya Løgtingi loyvi til í 2009??

At enda vil eg sitera ein vísan mann, sum einaferð skal hava sagt: »Lad ikke talerstolen blive kujonernes platform!«

# MVG og hvat so?

**GUDMUND LARSEN**

Fleiri og fleiri hava verri og verri við at fáa endarnar at røkka saman í hesum landi.

Skattur og avgjøld av ymiskum slag avloysa hvørt annað, og tað hevur síðani havt við sær, at Føroyar eru vorðnar eitt av dýrastu londum í heiminum at liva í.

Arbeiðsmenn og arbeiðskvinnur sum hava sína dagligu gong á flakavirkjum kring landið munnu ganga í sínari óvissu og vóna, at tað kemur nakað av fiski upp á land, so tey kunna royna at vinna sær eitt sindur av peningi, so tey kunna gjalda fyri øll hesi lógarbundnu avgjøld, sum landsins myndugleiki hevur álagt teimum, kommunuskatt, landsskatt, MVG, sjúkrakassi, sjónvarpsgjald, oljugjald við meira, ja listin er langur.

Um hesar kvinnur og menn ikki klára at gjalda tað, sum er álagt teimum, er myndugleikin skjótur við at hótta hesu menniskju.

**»Tit hava 14 dagar at gjalda tykkara skuld í, umikki goldið er innan xx-xx-xxxx verður skuldin send til innheintingar«**

Ja soleiðis ljóðar tað, tá vit sum royna at gjald fyri okkum í hesum landi verða mint á, at vit skulu gjalda øll tey gjøld, ið eru áløgd okkum av landsins myndugleika, og tað er líkamikið um vit hava ráð ella ikki.

Tað sum eg eisini undrist á er, hvussu landsins myndugleiki hevur givið nøkrum fáum føroyingum loyvi til at stjala 10tals milliónir í MVG og koyra tað í egna lumma, uttan at nakað hendur.

Fyrst frá tí meiniga manninum, ið hevur verið noyddur at gjalda MVG fyri tað arbeiði sum hesi feløg hava gjørt fyri tey, tað vil siga eina eyka útreiðslu, áløgd av landsins myndugleika, og sum dýrkar arbeiði við 25%.

Síðani hugsi eg um hetta. Hvat nú, tá hesi feløg, ið hava havt stór arbeiði hjá kommunum við meira. Og har teir kanska fáa útgoldið 1 millión bara í MVG, stjal henda pening, uttan at blunka við, og harvið gera tað, at tapið hjá myndugleikanum ikki meira er tann eina milliónin, men kanska tvær milliónir, við tað at kommunan, ella hvør tað enn er, fer og søkir um at fáa MVGið aftur sum teir jú hava goldið til landið.

Hugsi síðani um, hvussu Taks kann lata nøkur fá sleppa at skylda milliónir, meðan onnur verða kravd eftir nøkrum fáum krónum.

Mær vitandi fara allar alarmklokkur í gongd, tá MVG skuldin fer upp um 100.000 krónur, ja hoyrt er um ein, sum var hóttur fyri 3 krónur.

Og tí er mín spurningur til tykkum hesin. Hvussu kunna 10tals milliónir gleppa ímillum fingrarnar á tykkum, uttan nakar veitt hvat, ella hví, og har tað samstundis ikki sleppa nakrar fáa krónur frá tykkara vakna eygað ljóðar sera merkiligt, má sigast.

Hvør hevur skylduna at hetta kann lata seg gera? Og hvør hevur ábyrgdina av hesum?

Hugsi aftur um tær barnafamiljur, arbeiðsmenn, arbeiðskvinnur, og tey gomlu, sum royna at gjald fyri seg, við teimum fáu krónum tey forvinna sær, og síðani skula standa og síggja, hvussu nøkur fá kunna stjala milliónir frá landinum, eitt land sum bara tosar um at skerja, lukka deildir á sjúkrahúsum, osv. Nei farið út og krevji hendan pening inn, hetta er okkara peningur, geri tykkara arbeiði.

**ps**
Hava tit nakra hóming av, hvussu kappingaravlagandi hetta er fyri tey feløg, sum gjalda tað, tey skulu, MVG við meira?

Tí hugsa, at kunna verða 25% bíligari av einum arbeiði, tí man ikki hevur hugsað sær at gjald tað MVG, sum man tekur inn, ja tá er ongin kjansir hjá tí sum er ERLIGUR.

# Búnaðargrunnurin

**ÓLI J. MÜLLER**

Búnaðargrunnurin er sprottin úr peningi, sum inn er komin við sølu av almennari jørð.

Tann almenna jørðin, ið er hoyrandi undir búnaðarstovuni, verður umsitin av festarunum.

Landið, kommunur og ein og hvør kann keypa av hesu somu jørð, tó ongantíð festarin.

Hvørja ferð tað verður selt av festinum, hevur festarin tað minni at liva av.

Peningurin fyri ta seldu jørðina verður settur inn á festikonto í búnaðargrunninum, og oyramerktur til tað festið, sum hevur mist jørðina.

Jarðarráðið, nú Búnaðargrunnurin, er settur at umsita tann innkomna peningin, ið er um 200 mill. kr. í alt.

Tey flestu festini í landinum hava bert seyð.

Hini, sum eru gott 30 í alt, hava seyð og neytahald, og festararnir av hesum brúkunum hava hetta sum fulltíðarsrarv við arbeiðsdøgum nógv longri enn vanlig arbeiðstíð upp á 8 tímar.

Skal mjólkarframleiðslan klára seg framyvir, má nýhugsan til.

Flestu neytafjósini í landinum eru ótíðarhóskandi, og liva ikki upp til krøv sum: djóravælferð, atlit til umhvørvið, arbeiðsumstøður v.m.

Skal mjólkarframleiðslan klára seg framyvir, má nýhugsan til.

Tað eru fleiri niðurslitin fjós í landinum, sum eftir dagsnormi eru óegnaði til víðari mjólkarframleiðslu, og verða tí lokaði, grundað á vantandi fígging og harvið dagføring, og vera helst fleiri niðurløgd neytahald at síggja sum tíðin líður.

Tað er syndarligt at staðfesta, hvussu lítla virðing og forstáilsi okkara fólkavaldu, ið áttu at hugsa um framtíðina, hava fyri hesu vinnu.

Hóast nógvar forðingar eru tað bøndur, ið royna at hugsa um framtíðina, og hava bygt nýmótans fjós.

Tað er óskiljandi, at Búnaðargrunnurin ikki kann vera við í fíggingini av tílíkum íløgum.

Tá tann almenni grunnurin ikki vil, ella hevur vilja til at vera við at fíggja neyðugar broytingar í framtíðar mjólkarframleiðslu í Føroyum, eru hesir bøndur farnir aðrar leiðir, og verður konsekvensurin tá óneyðiga høgur.

Hetta er ein støða, sum okkara politikarir eiga at gera nakað við.

Fyri einari tíð síðani byrjaðu politikarirnir at tosa um at fáa hendur á ymiskun grunnum, og har ímillum Búnaðargrunnin, sum búnaðarmenn hava so stóran tørv á.

Hetta er eftir teirra tykki deyður kapitalur.

Sannleikin er, at bøndurnir ikki fáa fatur á sínum peningi fyri leiðsluni á grunninum. Skil tað hvør í vil. Ein skuldi trúð, at øll, sum hava nakað við landbúna at gera skuldu frøst yvir, at nakar tímur og torur at gera íløgur í landbúna her í landinum, og so á almennari jørð aftrat.

Á sama hátt, sum rækjuveiðan fór fyri bakka, tann seinasti føroyski tarvurin bleyv avlívaður í gáloysni, kann føroyskt neytahald lætt fara sama veg, um ikki verður handlað nú.

Eg fari at heita á allar góðar kreftir, tað veri seg politikarar, embætisfólk ella hvønn, sum hevur ávirkan, at arbeiða fyri at neytahaldið her í landinum fær so góðar umstøður at virka undir sum gjørligt.

Latið landbúnaðin fáa festikontoinar at endurnýggja síni brúk við.

Av tí at bóndin skal skjalprógva fyri hvørja króna, sum nýtt verður úr Búnaðargrunninum, nýtist eingin at vera bangin fyri at peningurin verður nýttur til annað, enn tað hann er játtaður til.